# Nýggj útstykking í Nes kommunu

Nes kommuna hevur gjørt 25 byggibúgvin grundstykkir miðskeiðis á Toftum. Av teimum eru 14 seld, og við hesum verða hini boðin út í almennari sølu.

Kostnaðurin er kr. 297.500, og klárt verður at byggja við ársbyrjan 2009.

Áhugað kunnu ringja til Aksel Højgaard á teknisku deild, tlf. 56 50 01.

Nes kommuna




www.havsbrun.fo



## Vit sóknast eftir góðsku- umhvørvisleiðara

Havsbrún er eitt av stórstu og tøkniliga mest framkomnu framleiðsluvirkjunum í Føroyum við 90 starvsfólkum og einum umsetningi uppá uml. 600 mill. Kr. Árliga. Havsbrún framleiðir fiskamjøl- og lýsi á mjøldeildini, og alifóður á fóðurdeildini.

Vit koma í nærmastu framtíð at hava brúk fyri einum góðsku- umhvørvisleiðara og vilja hervið eggja áhugaðum at søkja hettar starv.

**Arbeiðsuppgávur:**
- At umsita góðskukervi á øllum virkinum.
- At umsita samskiftið við mynduleikar á ymiskum økjum.
- At samskipa og leiða umhvørvisarbeiði hjá virkinum.
- Verða leiðari fyri innanhýsis starvstovuna.

**Vit rokna við at tú hevur:**
- Fyrisitingarligt hegni.
- Áhuga fyri góðsku- umhvørvismálum.
- Dugir at tillaga arbeiðsdagin, ið kann verða skiftandi.
- Eldhuga og ágrýtni.

Tú skal tola ymiskar tillagingar í arbeiðsuppgávum eins og nýggjar uppgávur kunnu koma afturat. Lønina tosa vit um.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum dynamiskum umhvørvi, har menningin gongur skjótt og avbjóðingarnar broytast alla tíðina.

Hevur hettar tín áhuga, so send eina umsókn so skjótt sum gjørligt. Tó seinast 01. Jan. 2009. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Vilt tú vita meira, ert tú vælkomin at seta teg í smb. við Harvig Joensen, deildarleiðara ella senda ein teldupost.

HAVSBRÚN

pf Havsbrún
FO-530 Fuglafjørður
Tlf 41 44 00
Fax 41 44 01
E-mail: haj@havsbrun.fo

